# LAND



*Fossá áðrenn byrgingarnar*





*Tveir av vøkru fossunum í Fossá, sum bert livna uppaftur tá SEV reinsar turbinurnar*

# Tosaðu um vatnorkuætlanir SEV's

Poul Hansen



### Ósamdir!!

So letur í honum »Hygg at Vestmanna. Vit hava einki mist« (av náttúruni)

Nú velst alt um eygað, ið sær og hesuferð hyggja vit nærri at útbyggingunum oman fyri Vestmanna, landinum áðrenn og aftaná og lesarin kann so sjálvur meta um nakað er mist.

Eisini verður greitt frá, hví hesar útbyggingar hóast alt eru øðrvísi enn útbyggingin í Norðureysturoy og komandi útbyggingar av Víkavatni, Vágum og Dølum.

### Fossá

í Vestmanna rennur í Vatnið »Frammi á Vatni« gjøgnum Fonsdal og er vatnríkasta á í Føroyum.

Ovara byrgingin í Fonsdali, sum byrgdi Vatnið og Fossá inni, var byrjað í 1952 og liðug í august 1953.

Síðani varð byrgingin á Lómundaroyri í Fonsdali gjørd.

Í 1958 varð í Dalá vestan fyri veitt yvir í Fonsdal.

### Heljareygað

er hin stóra áin í Vestmanna. Rennur gjøgnum Mýrarnar og í Heygardal. So vatnrík er áin, at hon einsamøll fyllir vatngoymsluna í Heygardali – byrgingin 23 m høg – uttan, at aðrar áir eru førdar í Heljareygað.

Byrgingarnar á Mýrunum og í Heygadali vórðu lidnar í fyrru helvt av trýssunum.

Í Vestmanna fevndi vatnorkuútbyggingin tí stórt sæð bert um at byrgja upp fyri Fossá í Fonsdali og Heljareygað í Heygardali.

### Munurin

á vatnorkuútbyggingini í Vestmanna og Eiði, Víkavatni, Dølum og Vágum er tann, at í Vestmanna er stórt sæð alt vatnið savnað í tveimum áum, sum renna í tveimum dølum – Fonsdali og Heygardali.

Hesir báðir dalar vórðu byrgdir og tað var stórt sæð vatnorkuútbyggingin í Vestmanna.

Haraftur ímóti fevnir útbyggingin á Eiði – nevnt Eiði 1 – IV – ikki bert at byrgja upp fyri Eiðisvatni við 2 byrgingum har einasta á av týdningi – Argisáin – rennur í Vatnið, men neyðugt var eisini at taka allar áir á norðurvestursíðuni í Eysturoy, líka frá Øksnaránni norðanfyri Slættaratind til Blásenda sunnanfyri Veðranes.

Funningsmegin eru allar áir frá Stórá í Funningi til Vesturdalsá Millum Fjarða førdar norður í Eiðisvatn.

### Víkavatn

liggur á norðureystursíðuni á Streymoy. Ongin á av týdningi rennur í Víkavatn.

Tí er neyðugt hjá SEV – tá felagið hevur gjørt eina 23 m høga byrging á suðursíðu ni á Víkavatni – at leiða allar áir eystanfyri Saksunardal frá Streymneshálsi og líka norður til Sjeyndir, í Víkavatn til tess at fáa nakað av vatni í byrgingina.

### Dalar

Til byrging í Dølum skal alt vatn norðurímóti Saksun, allar áir í Dølum og allar áir Hvalvíksmegin Saksunardal heilt suður í Toftadalsáir sunnanfyri Hvalvík umframt part av avfallsøkinum til Dalá og Argisá, sum renna í Leynavatn, førast norð í Dalar.

Eisini skulu áirnar í Djúpadali, Øksnadali og Nálagjógv, sunnanfyri Dalar, førast norð í Dalar.

### Vágar

Har vil SEV savna alt vatn norðan fyri Háls í Sandavági og eystanfyri Sørvágs/Leitisvatn og Fjallavatn í eina byrging Uppi í Glyvur.

Hóast øll Norðurstreymoy og eystursíðan av Vágum verða turrlagdar, er tað framvegis alt ov lítið vatn til eina lønandi el-framleiðslu.

Vatnorkuætlanir SEV's eru tí á ongan hátt fíggjarliga forsvarligar.

Tað fara vit at hyggja nærri eftir næstu ferð.